LØGTINGSINS UMBOÐSMAÐUR

Umhvørvismálaráðið

Tórshavn, tann 20. februar 2024
J.Nr.: LUM-16- 23/16837-57
(at tilskila í svari)
Tykkara J.nr. 23/17454

# Álit

um góðkenning frá Umhvørvismálaráðnum av broyting av byggisamtykt fyri Tvøroyrar kommunu

## 1. Niðurstøða umboðsmansins

*Umboðsmaðurin hevur viðgjørt eina klagu um góðkenningina frá Umhvørvismálaráðnum av eini broyting av byggisamtykt fyri havnarøki "D" í Tvøroyrar kommunu. Tvøroyrar kommuna hevði søkt um góðkenning av eini aðrari orðing enn henni, sum hevði verið alment kunngjørd. Umhvørvismálaráðið metti, at talan var um eina broyting, sum ikki broytti identitetin í upprunaliga uppskotinum, sum vildi verið fortreytin fyri, at ráðið kravdi nýggja hoyring. Umboðsmaðurin var ikki samdur við Umhvørvismálaráðnum í hesi meting og helt, at ráðið átti at kravt, at uppskotið varð lagt fram til alment eftirlits av nýggjum og nýggja almenna kunngerð, áðrenn málið varð lagt fyri býarskipanarnevndina. Umboðsmaðurin helt tí, at ráðið ikki átti at góðkent uppskotið tann 10. juli 2023. Umboðsmaðurin gav Umhvørvismálaráðnum eina átalu fyri málsviðgerðina og mælti eisini Umhvørvismálaráðnum til at endurskoða málið.*

## 2. Málslýsing

Við skrivi, dagfest 8. mai 2023, søkti Tvøroyrar kommuna Umhvørvismálaráðið um góðkenning av broyting av byggisamtykt fyri havnarøkið "D" á Tvøroyri.

Við góðkenningarskrivi, dagfest 10. juli 2023, boðaði Umhvørvismálaráðið Tvøroyrar kommunu frá, at treytirnar fyri at góðkenna broytingarnar í byggisamtyktini, soleiðis sum Tvøroyrar kommuna hevði biðið um, vóru loknar. Í skjølum og frágreiðingum verður hetta góðkenningarskrivið eisini umrøtt sum verandi dagfest 7. juli 2023, men eg nýti 10. juli 2023, tá eg vísi til góðkenningarskrivið, við tað at hetta er dagfestingin á tí skjali, eg havi fingið avrit av.

## 3. Klagan

Við skrivi, dagfest 23. august 2023, sendi Áhugabólkurin Livilig kor á Tvøroyri klagu um góðkenningina frá Umhvørvismálaráðnum av broyting av byggisamtykt fyri Tvøroyrar kommunu. Klagan snúði seg um broyting av byggisamtyktini fyri havnarøki og varð lýst á henda hátt:

> **“Kæra um góðkenning frá Umhvørvismálaráðnum hin 11. juli 2023 til broyting av byggisamtykt fyri Tvøroyrar kommunu.**
>
> Vegna Livilig Kor á Tvøroyri verður við hesum kært:
>
> 1. Ein ikki nøktandi og fullfíggjað kunngerð frá Tvøroyrar kommunu hin 23. februar 2023 til broyting av byggisamtykt fyri havnarøki á Tvøroyri, hvørs endamál er at heimila byggiloyvi til ... *(eitt vinnuvirki, mín viðm.)* og útbygging av verandi virkinum við mjøl- og lýsiverksmiðju.
>
> 2. Góðkenning av broytingaruppskotinum frá landsstýriskvinnuni í Umhvørvismálaráðnum, ..., hin 11. juli 2023.
>
> 3. Málsviðgerð, álit, við tilmæli frá Býarskipanarnevndini til góðkenning av broytingaruppskotinum, dagfest 3. juli 2023.
>
> Málsgongdin frá kunngerð av broytingaruppskotinum til galdandi byggisamtykt fyri Tvøroyrar kommunu og mótmæli og broytingaruppskot frá áhugabólkinum Livilig Kor á Tvøroyri frá 4. juli 2023, og til í dag, kann sigast at hava verið rættuliga drúgv í allar mátar, og uttan at rokkið er hartil, sum kravt hevur verið, at Umhvørvismáláráðið tekur til eftirtektar, at kunngerðin løgd er fram ikki er nøktandi og smb. Býarskipanarlógini, og tí skal geva boð til Tvøroyrar kommunu at leggja broytingaruppskotið fram av nýggjum.
>
> 1.
> Frá ávísing í mótmælinum og broytingaruppskotinum til ítøkiligu broyting av byggisamtyktini fyri økispartin § 29 D: Havnarøki, at uppskotið ikki er útinnt og orðað sum ásett í Býarskipanarlógini § 5, stk. 7, at ein góðkend byggisamtykt kann verða broytt ella víðkað við nýggjum og greiniligari reglum viðvíkjandi teim í stk. 4 og 5 umrøddu viðurskiftum eftir reglum, sum settar eru fyri nýggjar samtyktir, og at tað staðiliga í fleiri teldupostum yvir fyri Umhvørvismálaráðnum er víst á hesa grein í Býarskipanarlógini, at kunngerðin frá Tvøroyrar kommunu ikki er røtt orðað og frágingin, grundað á at løgd er fram ein broyting til § 29 stk. 4, í galdandi yvirskipaðu góðkendu byggisamtykt fyri kommununa frá 24. mars 2014, og har tað er lagt afturat tekstinum í stk. 4 og sett í klombru herundir siloir og skorsteinar.
> Í býarskipanini fyri Tvøroyrar kommunu eru løgd út 6 havnarøki, ið eru fevnd av § 29. Kunngerðin hevur í sær rætta kortskjalið til kunngerðina frá 23. februar 2023, men orðar ikki nýggjar og greiniligar reglur viðvíkjandi teim í stk. 4 og 5 umrøddu viðurskiftum eftir reglum, sum settar eru fyri nýggjar samtyktir.

Broytingin framd verður í byggisamtyktini fevnir um almennu byggisamtyktina og av tí orsøk verður henda at galda fyri øll 6 havnarøkini.

Í svarskrivi frá Tvøroyrar kommunu hin 27. apríl til Livilig Kor á Tvøroyri, verður m.a. ført fram, at ”Býarskipanarlógin ongar ásetingar ella krav hevur um serstakar byggisamtyktir, tó at hesin reguleringsháttur av og á verður valdur fyri ávís øki”.

Her kann so leggjast afturat, at orðingin ”serstøk byggisamtykt” ikki finnist í Býarskipanarlógini, men at henda vending, so at siga síðan lógin varð sett í verk í 1954, er brúkt har broytingar eru gjørdar í byggisamtykt fyri ávísan økispart.
Her kann so vísast til byggisamtyktina frá Tvøroyrar kommunu, Partur 6. Aðrar reglur, har tað í § 50 er skrivað: Serstakar byggisamtyktir. Og enntá í §52: Broytingar í byggisamtyktini.

Talan er her um samanbland og eisini beinleiðis skeivar ásetingar, ið ikki eru heimilaðar í Býarskipanarlógini. Ein ítøkilig broyting av byggisamtykt fyri størri ella minni økispart, óansæð stødd, skal gerast sum ásett er í § 5. stk. 7, og skal umrøðast og orðast við egnum frámerki sum t.d. Broyting Dl ella Serstøk byggisamtykt Dl til § 29 økispartin D:Havnarøki og, sum lógin ásetur,...við nýggjum og greiniligari reglum viðvíkjandi teim í stk. 4 og 5 umrøddu viðurskiftum eftir reglum, sum settar eru fyri nýggjar samtyktir.

Í viðmerking frá Tvøroyrar kommunu, Tekniska Deild, hin 18. apríl 2023, kring kæruna frá Livilig Kor, at broytingin av byggisamtyktini fyri § 29 økispartin D. Havnarøki ikki er frágingin sum ásett, verður m.a. skrivað:
Á einum øki í mótmælinum er tó nakað at umhugsa: Tað er rætt, at broytingini í D: Havnarøki verður galdandi fyri øll havnarøki í kommununi, og um tað ikki er ynskiligt ella ætlanin, hevði tað helst verið eitt hugskot at gera eitt nýtt havnarøki ”D2”, sum inniheldur ásetingar um bygging av goymslubrunnum og skorsteinum. D: Havnarøki broytir so navn til Dl, men er annars óbroytt. ” Og víðari verður skrivað: ”Viðheft er uppskot til orðing av ”D2”.

Tekniska Deild viðurkennir her at broytingin av byggisamtykt løgd er fram 23. februar allarhelst ikki er røtt, og tí av røttum skuldi havt egið frámerki sum t.d. D2. At D:Havnarøki so skal broyta navn til Dl....er rættuliga óskiljandi og heldur ikki neyðugt.

...

2.
Hin 11. juli boðar Kringvarp Føroya m.a. frá, í samrøðu við landsstýriskvinnuna í Umhvørvismálum, ..., at ætlan er at endurskoða Býarskipanarlógina, møguliga gera nýggja lóggávu at verða klára í 2024, og at henda lóg skal seta krøv til burðardygga býar- og bygdamenning. Her verdur eisini boðað frá, at kunngjørda broyting til byggisamtyktina fyri Tvøroyrar kommunu er gingin á møti, og at alt er farið fvrisitingarliga rætt fram av kommununi. Tó so, stóð tað til ... *(landstýriskvinnuna í Umhvørvismálum, mín viðm.)*, var umsóknin hjá Tvøroyrar kommunu um at broyta byggisamtyktina fyri havnarlagið, ikki gingin á møti.

Við hesi fráboðan varð 13. juli skrivað til Umhvørvismálaráðið og avrit til Løgmálaráðið og víst á, at málsviðgerðin og broytingaruppskotið til byggisamtykt fyri havnarlagið á Tvøroyri ikki var útinnt soleiðis sum Býarskipanarlógin ásetur.
Umhvørvismálaráðið svarar aftur 18. juli og uttan at umrøða ítøkiliga evnið, at kunngerðin í sínum innihaldi ikki er rætt frágingin. Víst verður í svarskrivi sama dag, at talan ikki er um tíðarfreistir, val og raðfestingar, men at ítøkiligar ásetingar í Býarskipanarlógini ikki eru fylgdar.

...

3.
...

Í álitinum frá Býarskipanarnevndini verður m.a. skrivað: "kommunan burdi havt tikið hædd fyri, at broytingin í byggisamtyktini til D bert átti at fevna um ítøkiligu ætlaðu víðkanina. Av tí at avmarking ikki er gjørd í hesum sambandi, viðførir hetta at broyttu ásetingarnar fyri D koma at verða galdandi fyri øll D øki í kommununi.”

Niðurstøðan er tann sama sum kæran frá Livilig kor í mótmælinum og broytingaruppskotinum frá 4. juli. Altso er eingin ivi, at kunngerðin og tess innihald frá 23. februar, sum ásett í § 5, stk. 7 í Býarskipanarlógini ikki var nøktandi og fullfíggjað.

Ein broyting til byggisamtykt, við teim byggingarfyriskipandi reglum settar skulu verða til hvussu byggjast kann á ávísa øki, er og verður grundarlag til málsviðgerð og at heimila einum byggiloyvi sambært reglunum. Byggingarfyriskipandi reglurnar skulu verða tøkar innan málsviðgerð og byggiloyvi kann gevast. Tí letur tað seg ikki gera, sum Býarskipanarnevndin framhaldandi skrivar: ”Hetta eigur kommunan at fáa rættað í eini seinnri broyting av byggisamtykt fyri Tvøroyrar kommunu”.

Byggiloyvi kann ikki gevast uttan so at byggingarfyriskipandi reglurnar eru tøkar. Tað letur seg ikki gera og eigur heldur ikki at bera til.

Henda orðing eigur ikki at koma fyri í Býarskipanarnevndini, ið er sett við fakfólkum, ið av røttum eiga at vita, at bygging ikki kann heimilast uttan so at byggingarfyriskipandi reglurnar eru tøkar. Av røttum eigur Býarskipanarnevndin at fáa eina álvarsama átalu fyri hesa orðing.

Vegna Livilig Kor á Tvøroyri vil eg við hesum heita á Løgtingsins Umboðsmann at viðgerða hetta ítøkiliga mál har hildið verður fast við, at broytingin til byggisamtykt frá Tvøroyrar kommunu kunngjørd 23.februar, ikki er frágingin samb. Býarskipanarlógini og tí ikki fyrisitingarliga rætt avgreidd. Kravt verður tí, at Umhvørvismálaráðið og ... *(landstýriskvinnan í Umhvørvismálum, mín viðm.)* boða Tvøroyrar kommunu frá, at leggja kunngerðina fram av nýggjum og soleiðis sum ásett er í Býarskipanarlógini.”

## 4. Viðmerkingar frá myndugleika og klagara

Tann 1. september 2023 varð klagan send Umhvørvismálaráðnum til kunningar. Samstundis varð Umhvørvismálaráðið biðið um at lata umboðsmanninum øll skjøl í málinum fyri, at umboðsmaðurin kundi kunna seg um málið.

Tann 5. september 2023 sendi Umhvørvismálaráðið umboðsmanninum avrit av skjølum í málinum hjá Umhvørvismálaráðnum og býarskipanarnevndini, viðvíkjandi góðkenning av broyting av byggisamtyktini fyri havnarøkið "D" á Tvøroyri.

Tann 11. september 2023 bað umboðsmaðurin Umhvørvismálaráðið um eina frágreiðing um viðgerðina av málinum. Umboðsmaðurin bað herundir um at fáa frágreiðing um, hvør viðgerð var farin fram av tí ætlaðu broytingini av orðingini í § 29 D: Havnarøki, stk. 4, um góðkenningarskrivið frá Umhvørvismálaráðnum, dagfest 10. juli 2023, eisini umfataði hesa broyting og í so fall við hvørjari orðing. Umhvørvismálaráðið varð eisini biðið um at lata umboðsmanninum avrit av starvsskipan fyri býarskipanarnevndina.

Tann 18. september 2023 sendi Umhvørvismálaráðið soljóðandi frágreiðing um viðgerðina av umsókn frá Tvøroyrar kommunu um góðkenning av broyting í byggisamtykt:

> "
>
> ...
>
> Gongdin í málinum
>
> 11. mai 2023 fekk Umhvørvismálaráðið umsókn frá Tvøroyar kommunu um at góðkenna broyting av byggisamtykt fyri havnaøkið "D" á Tvøroyri.
>
> Umhvørvismálaráðið kannaði síðani, um formligu viðurskiftini í sambandi við broytingina vóru í lagi, herundir:
>
> 1) um uppskotið er samtykt á kommunustýrisfundi,
>
> 2) um kunngjørt er um framløgu sum ásett í § 6, stk. 1 í løgtingslóg um býarskipanir og byggisamtyktir,
>
> 3) um framløgutíðarskeiðið var 3 vikur sum ásett í § 6, stk. 1 í løgtingslóg um býarskipanir og byggisamtyktir,
>
> 4) um freistin at lata inn motmæli og broytingaruppskot var 6 vikur frá kunngerðardegnum sum ásett í § 6, stk. 1 í løgtingslóg um býarskipanir og byggisamtyktir,
>
> 5) um býráðið hevur tikið støðu til mótmæli og broytingaruppskot sum ásett í § 6, stk. 2 í løgtingslóg um býarskipanir og byggisamtyktir,
>
> 6) um mótmæli og broytingaruppskot, sum byráðið ikki valdi at fylgja, vóru við í tilfarinum til Umhvørvismálaráðið sum ásett í § 6, stk. 2 í løgtingslóg um býarskipanir og byggisamtyktir.
>
> Tá Umhvørvismálaráðið hevði staðfest, at formligu viðurskiftini vóru í lagi, sendi Umhvørvismálaráðið Býarskipanarnevndini málið til ummælis smb. § 2, stk. 2 í løgtingslóg um býarskipanir og byggisamtyktir tann 26. mai 2023.

Býarskipanarnevndin lat tann 3. juli 2023 Umhvørvismálaráðnum álit. Býarskipanarnevndin hevur ymiskar viðmerkingar til byggisamtyktina, men viðmælir kortini broytingunum. Býarskipanarnevndin viðmerkir m.a.
"at kommunan burdi havt tikið hædd fyri, at broytingin í byggisamtyktini til D bert átti at fevna um ítøkiligu ætlaðu víðkanina. Av tí at avmarking ikki er gjørd í hesum sambandi, viðførir hetta, at broyttu ásetingarnar fyri D koma at vera galdandi fyri øll D í kommununi. Hetta eigur kommunan at fáa rættað í eini seinni broyting av byggisamtyktini fyri Tvøroyrar kommunu."

Hetta, sum Býarskipanarnevndin vísir á, verður eisini ført fram í mótmælinum, sum áhugabólkurin "Livilig kor á Tvøroyri" lat Tvøroyrar kommunu í sambandi við almennu hoyringina um broytingina í byggisamtyktini.
Í gerðabókini hjá Tvøroyrar býráð frá fundi 27.04.2023 sæst, at sjónarmiðið, sum ført verður fram í mótmælinum frá "Livilig kor á Tvøroyri" og í álitinum frá Býarskipanarnevndini, um at broytingin fyri øki D bert átti at fevnt um ein avmarkaðan part av havnaøkinum, er lagt fyri byráðið í viðmerkingum frá teknisku deild dagfestar 18.04.2023, har tað m.a. stendur soleiðis:
"Á einum øki í mótmælinum er tó nakað at umhugsa: Tað er rætt, at broytingin í D: Havnarøki verður galdandi fyri øll havnaøki í kommununi, og um tað ikki er ynskiligt ella ætlanin, hevði tað helst verið eitt hugskot at gera eitt nýtt havnarøki "D2 ", sum inniheldur ásetingar um bygging av goymslubrunnum og skortsteinum.
D: Havnarøki broytir so navn til D1, men er annars óbroytt.

Á býráðsfundinum 27.04.2023 samtykkir býráðið einmælt, eftir tilmæli frá Vinnu- og havnanevndini, Teknisku nevnd og Trivnaðarnevndini
"at halda fast í býráðssamtyktini frá 20. februar 2023 um broyting av byggisamtyktini og víðkan av havnarlagnum, tó ... verður ... orðingin í D: Havnarøki stk. 4, [tillagað] til: "Eingin partur av útveggi ella tekju má vera hægri enn 11,5 m, tó kunnu neyðugir tekniskir húsalutir vera hægri eftir nærri góðkenning býráðsins. Goymslubrunnar kunnu í mesta lagi vera 20 m høgir, og skorsteinar i mesta lagi vera 60 m høgir. Slík hægri bygging skal altíð sendast til almennar hoyringar."

Í uppskotinum, sum fór til hoyringar, var orðingin:
"Eingin partur av útveggi ella tekju má vera hægri enn 11,5 m, tó kunnu neyðugir tekniskir húsalutir, herundir siloir og skorsteinar, vera hægri eftir nærri góðkenning býráðsins. "

Umhvørvismálaráðið metti, at talan var um eina broyting, sum ikki broytti identitetin í upprunaliga uppskotinum, sum vildi verið fortreytin fyri, at Umhvørvismálaráðið kravdi nýggja hoyring.

Umhvørvismálaráðið metir ongan iva vera um, at avgerðin hjá býráðnum, um ikki at býta havnaøkið upp í Dl og D2, men heldur lata broytingina galda fyri alt havnaøkið í kommununi, er tikin á upplýstum grundarlag.

Tað uppskotið um broyting í byggisamtykt, sum víst verður til í góðkenningarskrivinum frá Umhvørvismálaráðnum til Tvøroyrar kommunu dagfest 10. juli 2023, er uppskotið, sum

Tvøroyrar kommuna sendi Umhvørvismálaráðnum tann 11. mai 2023 (j.nr. 23/00071). Í umsóknini, sum nágreiniliga greiðir frá málsviðgerðini hjá kommununi, hevur pkt. 5 yvirskriftina "Byggisamtyktarreglur fyri og eftir broytingina". Í seinna brotinum undir pkt. 5, ovast á síðu 3, stendur soleiðis:

§ 29: Øki D: Havnarøki – eftir broytingina, (einasta broyting er punkt 4, ið er skriva við feitari skrift)

...

4) Eingin partur av útveggi ella tekju má vera hægri enn 11,5 m, tó kunnu neyðugir tekniskir húsalutir vera hægri eftir nærri góðkenning býráðsins. Goymslubrunnar kunnu í mesta lagi vera 20 m høgir, og skorsteinar í mesta lagi vera 60 m høgir. Slík hægri bygging skal altíð sendast til almennar hoyringar.

...

Hetta er broytingin í byggisamtyktartekstinum, sum Umhvørvismálaráðið góðkendi við avgerðini, sum fráboðað var Tvøroyrar kommunu 7. juli 2023.

Umhvørvismálaráðið ásannar, at broytti byggisamtyktarteksturin ikki var fysiskt áteknaður við stempli og undirskrift frá Umhvørvismálaráðnum, saman við rættaða kortskjalinum, soleiðis sum vanliga verður gjørt. Mannagongdin fyri avgreiðslu av slíkum málum er vanliga tann, at Umhvørvismálaráðið, í góðkenningarskrivinum, biður um at fáa rættaði skjøl frá kommununi (kort og tekst) til átekningar. Av einhvørji orsøk er hetta ikki gjørt í hesum førinum, men hevur Umhvørvismálaráðið nú biðið Tvøroyrar kommunu um at fáa rættaða byggisamtyktartekstin til átekningar.

Sambært løgtingslóg um býarskipanir og byggisamtyktir § 7, stk. 1 er tað kommunan, sum formliga setir byggisamtyktina í verk við at kunngera hana. Umhvørvismálaráðið metir, at byggisamtykt fær rættarvirknað tá kommunan hevur kunngjørt hana. Umhvørvismálaráðið metir soleiðis ikki, at góðkenning frá landsstýrismanninum sambært § 4, stk. 1 í løgtingslóg um býarskipanir og byggisamtyktir í sær sjálvari gevur byggisamtyktini rættarvirknað, men at góðkenningin frá landsstýrismanninum er ein fyritreyt fyri, at kommunan, við at kunngera byggisamtyktina, kann geva hesi rættarvirknað. Broytingin, sum Umhvørvismálaráðið góðkendi 7. juli, fær tískil ikki rættargildið fyrrenn broytta byggisamtyktin hevur fingið fysiska átekning og er kunngjørd av Tvøroyrar kommunu. Til hetta er gjørt, er seinast kunngjørda byggisamtykt í gildið."

Við skrivi, dagfest 20. september 2023, varð frágreiðingin hjá Umhvørvismálaráðnum send klagaranum til ummælis við einari freist áljóðandi 14 dagar.

Tann 22. september 2023 sendi Umhvørvismálaráðið umboðsmanninum avrit av skrivi, sum varð sent Tvøroyrar kommunu. Talan var um rætting til góðkenningarskrivið frá 10. juli 2023, viðv. broyting í byggisamtyktini fyri Tvøroyrar kommunu – víðkan av havnarlagnum. Í skrivinum til Tvøroyrar kommunu boðaði Umhvørvismálaráðið frá, at Umhvørvismálaráðið við heimild í § 4 í býarskipanarlógini góðkendi, at byggisamtyktin fyri Tvøroyrar kommunu verður broytt

soleiðis, sum kommunan hevði søkt um. Í viðløgdu skjølunum sást rættaður byggisamtyktartekstur, har § 29: Øki D: Havnarøki, stk. 4 varð orðað soleiðis:

> "Eingin partur av útveggi ella tekju má vera hægri enn 11,5m, tó kunnu neyðugir tekniskir húsalutir vera hægri eftir nærri góðkenning býráðsins. Goymslubrunnar kunnu í mesta lagið vera 20 m høgir, og skorsteinar í mesta lagið 60 m høgir. Slík hægri bygging skal altíð sendast til almennar hoyringar."

Tann 30. september 2023 sendi klagarin umboðsmanninum sínar viðmerkingar. Klagarin vísti á, at landsstýriskvinnan ikki átti at góðkent uppskotið, av tí at tað ikki livdi upp til krøvini í lóg um býarskipanir og byggisamtyktir.

Hóast Umhvørvismálaráðið í sínum svari umrøddi § 6 í lóg um býarskipanir og byggisamtyktir, so vísti klagarin á, at klagan heldur snúði seg um § 5, stk. 7 í løgtingslóg um býarskipanir og byggisamtyktir, sum ásetir krøv til innihaldið í byggisamtyktum. Sambært § 5, stk. 7 kann ein góðkend byggisamtykt verða broytt ella víðkað við nýggjum og greiniligari reglum viðvíkjandi teim í stk. 4 og 5 umrøddu viðurskiftum eftir reglunum, sum settar eru fyri nýggjar samtyktir. Klagarin vísti á ymisk viðurskifti í hesum sambandi, sum hann ikki metti verða uppfylt við broytingini av byggisamtyktini.

Klagarin vísti eisini á, at broytingaruppskotið ikki varð útint sambært lóg um býarskipanir og byggisamtyktir, millum annað tí ein seinri broyting varð gjørd til tekstin, eftir at tilfarið hevði ligið frammi, og at broytingin tí av røttum átti at verið kunngjørd og hoyrd av almenninginum av nýggjum.

Av tí at klagarin eisini hevði sent klagu um málið til onnur enn Løgtingsins umboðsmann, varð málið, tann 4. oktober 2023, sett fyribils í bíðistøðu.

Við skrivi, dagfest 28. november 2023, varð Umhvørvismálaráðið kunnað um, at umboðsmaðurin tók málið upp aftur, eins og viðmerkingarnar hjá klagaranum frá 30. september 2023 vórðu sendar Umhvørvismálaráðnum til ummælis við einari freist áljóðandi 3 vikur. Umboðsmaðurin bað harumframt eisini Umhvørvismálaráðið um at greiða sær neyvari frá grundarlagnum undir metingini fyri ikki at krevja nýggja hoyring.

Tann 14. desember 2023 sendi Umhvørvismálaráðið umboðsmanninum soljóðandi frágreiðing:

> "...
> Ítøkiliga biður Løgtingsins Umboðsmaður Umhvørvismálaráðið greiða frá, grundarlagnum undir meting ráðsins um, at broytingin í byggisamtyktartekstinum, sum gjørdur var aftaná at hoyringin var framd, ikki broytti identitetin í upprunaligu ásetingini.
> ...
> Kærarin førir í viðmerkingunum fram, at reglur sambært § 5, stk. 4 og 5 "skulu orðast av nýggjum til eina broytta byggisamtykt fyri ávíst ætlað byggiøkið innan ávísa økispartin...".

Hetta er ikki rætt. Í tann mun, at eitt ávíst økið í byggisamtyktini verður víðkað ella broytt, so er ikki neyðugt at broyta ásetingarnar í byggisamtyktini, sum galda fyri viðkomandi økisslag. Um t.d. “Sethúsaøki” er skipað við ásetingum í byggisamtyktini, og kommunustýri samtykkir, at eitt øki í kommununi, sum áður ikki hevur verið “Sethúsaøki” skal broytast til “Sethúsaøki”, so er ikki neyðugt at broyta ásetingarnar í byggisamtyktini fyri tað. Í slíkum føri verður avmarkingin í kortskjalinum (býarskipanini) broytt, meðan ásetingarnar í byggisamtyktini verða óbroyttar.

Kærarin førir fram, at § 5, stk. 7 í løgtingslóg um býarskipanir “sigur púra greitt hvussu ein broyting av galdandi byggisamtykt skal fremjast...”. Í § 5, stk. 7 er ásett at ein ”byggisamtykt kann vera broytt ella víðkað, eftir somu reglum, sum settar eru fyri nýggjar samtyktir”. § 5, stk. 7 vísir til reglurnar í §§ 4, 6 og 7, sum snúgva seg um, hvussu ein byggisamtykt fær rættargildið. Ásetingin í § 5, stk. 7 vísir hinvegin ikki til § 5 stk. 1-6. Tó er eyðsæð, at ásetingarnar í § 5, stk. 1-6 eisini galda fyri eina byggisamtykt, sum verður broytt.

Kærarin skrivar, at "tilmælið frá Býarskipanarnevndini ... vísir álvarsligar manglar og feilir í innihaldinum til broytta byggisamtykt.”

Í álitinum frá Býarskipanarnevndini frá 03.07.2023 stendur m.a. soleiðis:

> Nevndin viðmerkir, at kommunan burdi havt tikið hædd fyri, at broytingin í byggisamtyktini til D bert átti at fevna um ítøkiligu ætlaðu víðkanina. Av tí at avmarking ikki er gjørd í hesum sambandi, viðførir hetta at broyttu ásetingarnar fyri D koma at verða galdandi fyri øll D øki í kommununi. Hetta eigur kommunan at fáa rættað í eini seinni broyting av byggisamtyktini fyri Tvøroyrar kommunu.
> Nevndin viðmerkir, at málið er nágreiniliga lýst og viðgjørt av kommununi, og bæði mótmælini eru viðgjørd og svarað við grundgevingum.
> Býarskipanarnevndin skal í síni viðgerð leggja dent á, at broytingin, eins og øll onnur planlegging, er grundað á hóskandi og haldgóða planlegging. Somuleiðis skal nevndin tryggja sær, at greitt er frá politisku viðgerðini av málinum í kommununi, og at hoyringartilgongdin eins og viðgerðin av innkomnum mótmælum hava verið nøktandi.
> Býarskipanarnevndin tekur undir við sjónarmiðnum um, at ídnaðarvirksemi í so stóran mun, sum talan er um í hesum føri, ikki er tað mest hóskandi tætt uppat bygdum og friðaðum øki. Nevndin tekur tó undir við viðmerkingunum hjá kommunuumboðunum um, at av tí at verandi virki er staðsett sum tað er nú, tala viðurskiftini fyri, at ætlaða víðkanin av havnalagnum verður gjørd í framhaldi av verandi virksemi.
> Nevndin staðfestir, at kommunan hevur viðgjørt og svarað innkomnu mótmælunum við grundgevingum.
> Niðurstøða: Nevndin samtykti, at viðmæla ætlaðu broytingunum við omanfyri nevndu viðmerkingum.

Sum sæst av tí omanfyri endurgivna er tað ikki rætt, tá kærarin skrivar, at álitið frá Býarskipanarnevndini vísir álvarsligar manglar og feilir í innihaldinum til broytta

byggisamtykt. Býarskipanarnevndin hevur nakrar viðmerkingar til innihaldið í broyttu byggisamtyktini, men talan er bert um sjónarmið hjá limunum í Býarskipanarnevndini, sum kommunustýrið kann velja at taka til sín ella lata vera. Sjónarmiðini hjá Býarskipanarnevndini hava ikki gildið fram um sjónarmiðini hjá meirilutanum í fólkavalda kommunustýrinum. Tá Býarskipanarnevndin í álitinum skrivar: "Hetta eigur kommunan at fáa rættað í eini seinni broyting av byggisamtyktini ..." so er talan um eitt óbindandi tilmæli frá Býarskipanarnevndini, tí nevndin hevur onga heimild til at geva kommununi boð um, hvussu byggisamtyktin skal vera orðað.

Kærarin vísir fleiri staðni í skrivinum frá 28.09.2023 til "feilir" í byggisamtyktini. Tað skilst at kærarin m.a. við hesum sipar til, at Tvøroyrar kommuna valdi at broyta ásetingina fyri alt økið D heldur enn at avmarka broytingina til eitt nýtt økið D2. Sum Umhvørvismálaráðið longu hevur víst á í frágreiðingini til Løgtingsins Umboðsmann frá 18.09.2023, so er ikki talan um nakran "feil", men um eina lógliga avgerð, sum kommunustýrið á Tvøroyri tok á upplýstum grundarlag, við tað at tað bæði í mótmælisskrivum og í tilmæli frá teknisku nevnd var ført fram, at frægara loysnin var at gera eitt nýtt øki D2. Hóast hetta samtykti Tvøroyrar býráð, at broytingin skuldi galda fyri alt øki D, og tað hevði kommunustýrið, eftir meting Umhvørvismálaráðsins, fulla heimild til at gera.

Kærarin førir fram, at uppskotið til broyting í byggisamtyktini átti at havt verið lagt fram aftur til alment eftirlit sambært § 6, stk. 1 í løgtingslóg um býarskipanir og byggisamtyktir, tí teksturin í broyttu byggisamtyktini, sum Tvøroyrar kommuna sendi Umhvørvismálaráðnum til góðkenningar, ikki var neyvt tann sami, sum Tvøroyrar kommuna hevði lagt fram til alment eftirlit. Umhvørvismálaráðið greiddi frá hesum spurningi í frágreiðingini til Løgtingsins Umboðsmann frá 18.09.2023, har tað m.a. stendur, at "Umhvørvismálaráðið metti, at talan var um eina broyting, sum ikki broytti identitetin í upprunaliga uppskotinum, sum vildi verið fortreytin fyri, at Umhvørvismálaráðið kravdi nyggja hoyring." Í skrivinum til Umhvørvismálaráðið frá 28.11.2023 biður Løgtingsins Umboðsmaður Umhvørvismálaráðið "greiða neyvari frá grundarlagnum undir hesi meting."
Í § 6, stk. 3 í løgtingslóg um býarskipanir og byggisamtyktir er ásett:

> Landsstýrismaðurin kann, tá ið mett verður, at eitt uppskot eigur at verða broytt í einum ella fleiri førum, áðrenn tað kann verða góðkent, gera av, at kommunustýrið av nýggjum skal leggja uppskotið við teim ætlaðu broytingum fram til alment eftirlits aftaná kunngerð eftir reglunum í stk. 1.

Í § 6, stk. 4 í løgtingslóg um býarskipanir og byggisamtyktir er ásett:

> Somuleiðis kann kommunustýrið, tá ið tað, orsakað av innkomnum mótmælum ella broytingaruppskotum, hevur samtykt at broyta hitt upprunaliga uppskotið, fáa í lag, at uppskotið við hesum broytingum verður framlagt av nýggjum.

Ásetingin í § 6, stk. 3 er um, tá góðkennandi myndugleikin krevur broytingar í einum uppskoti, áðrenn tað kann verða góðkent. Sambært ásetingini kann landsstýrismaðurin gera av, at broytt uppskot skal leggjast fram av nýggjum. Við tað, at tað í ásetingini stendur kann og ikki skal tulkar Umhvørvismálaráðið ásetingina soleiðis, at landsstýrismanninum er heimilað, um hann metir tað verða neyðugt, at seta sum treyt fyri góðkenning, at uppskot broytt sambært kravi frá honum, skal leggjast fram til alment eftirlit av nýggjum. Øvugt kann

landsstýrismaðurin, um hann ikki metir tað vera neyðugt við nýggjari framløgu, góðkenna eitt uppskot, sum er broytt í mun til tað, sum áður hevur verið framlagt til alment eftirlit sambært § 6, stk. 1, uttan at uppskotið verður lagt fram til alment eftirlit av nýggjum.

Ásetingin í § 6, stk. 4 er um, tá kommunustýri, áðrenn uppskot verður sent til góðkenningar, ger broytingar í uppskotinum í mun til uppskotið, sum hevur verið framlagt til alment eftirlit. Sambært ásetingini kann kommunustýrið, á sama hátt sum ásett í stk. 3, leggja broytta uppskotið fram av nýggjum, men er hetta ikki eitt ófrávíkiligt krav.

Hóast tað í nevndu ásetingum stendur kann og ikki skal, so metir Umhvørvismálaráðið kortini ikki, at tað stendur hvørki landsstýrismanni ella kommunustýri frítt fyri at gera av, um broytt uppskot skulu leggjast fram til alment eftirlit av nýggjum ella ikki. Avgerandi er tó, at ásetingarnar lata upp fyri, at tað ikki í øllum førum er neyðugt at leggja broytt uppskot fram til alment eftirlit av nýggjum. Í metingini um, hvørt tað er neyðugt at leggja broytt uppskot fram til alment eftirlit av nýggjum, metir Umhvørvismálaráðið tvey týðandi atlit verða 1) um rættindi borgarans vera skerd av broytingini og 2) um heimildir kommunustýrisins vera víðkaðar við broytingini. Harumframt er eitt avgerandi atlit, hvørt broytta uppskotið í høvuðsheitum er líkt upprunaliga uppskotinum ella við øðrum orðum, hvørt broytta uppskotið hevur sama identitet, sum upprunaliga uppskotið.

Í upprunaliga uppskotinum, sum varð lagt fram til alment eftirlit 23.02.2023 stóð:

> Eingin partur av útveggi ella tekju má vera hægri enn 11,5 m, tó kunnu neyðugir tekniskir húsalutir, herundir siloir og skortsteinar, vera hægri eftir nærri góðkenning býráðsins.

Umhvørvismálaráðið tulkar ásetingina í uppskotinum soleiðis:

> 1) Meginreglan er, at bygningar mugu ikki vera hægri enn 11,5 metrar.
> 2) Býráðið (kommunustýrið) kann í einstøkum førum geva loyvi til hægri bygging enn ásett í meginregluni, tá talan er um neyðugar tekniskar húsalutir, herundir siloir og skorsteinar (tó ikki avmarkað til siloir og skorsteinar)

Í endaliga byggisamtyktartekstinum, sum Tvøroyrar býráð samtykti á fundi 27.04.2023 og sum Umhvørvismálaráðið góðkendi 07.07.2023, stendur:

> Eingin partur av útveggi ella tekju má vera hægri enn 11,5 m, tó kunnu neyðugir tekniskir húsalutir vera hægri eftir nærri góðkenning býráðsins. Goymslubrunnar kunnu í mesta lagi vera 20 m høgir, og skortsteinar í mesta lagi vera 60 m høgir. Slík hægri bygging skal altíð sendast til almennar hoyringar.

Umhvørvismálaráðið tulkar endaligu ásetingina soleiðis:

> 1) Meginreglan er, at bygningar mugu ikki vera hægri enn 11,5 metrar.
> 2) Byráðið (kommunustýrið) kann í einstøkum førum geva loyvi til hægri bygging enn ásett í meginregluni, tá talan er um neyðugar tekniskar húsalutir.
> 3) Heimildin at geva undantaksloyvi sambært pkt. 2 er avmarkað, soleiðis at loyvi ikki kann gevast til goymslubrunnar (tað sama sum ‘siloir’) hægri enn 20 metra og skorsteinar hægri enn 60 metrar.

> 4) Áðrenn býráðið (kommunustýrið) gevur undantaksloyvi sambært pkt. 2 skal almenningurin hoyrast um málið.

Umhvørvismálaráðið metir ikki, at endaliga orðingin gevur loyvi til nakað, sum upprunaliga orðingin í uppskotinum ikki gevur loyvi til. Umhvørvismálaráðið metir soleiðis, at tað er identitetur millum upprunaliga uppskotið, sum var lagt fram til alment eftirlit og broytta uppskotið, sum Umhvørvismálaráðið góðkendi.

Umhvørvismálaráðið metir ikki, at broytta orðingin er meira tyngjandi fyri borgaran ella gevur kommunustýrinum víðari heimildir, enn upprunaliga orðingin gjørdi. Tvørturímóti metir Umhvørvismálaráðið, at broytta orðingin er meira avmarkandi enn upprunaliga orðingin, við tað at mark verður sett fyri, hvussu høgir bygningslutirnir, sum býráðið kann geva undantaksloyvi til, kunnu verða. Eisini er ásetingin um almenna hoyring í sambandi við undantøk, ein herðing í mun til upprunaliga uppskotið.

Við tað at linara orðingin (sum gevur kommunustýrinum óavmarkada heimild til at geva hæddarfrávik), hevur ligið frammi til alment eftirlit, metir Umhvørvismálaráðið ikki grundarlag vera fyri at krevja, at herda orðingin (sum avmarkar heimildina hjá kommunustýrinum til at geva hæddarfrávik og ásetir krav um almenna hoyring, men sum annars endurtekur meginregluna um hæddar hámark), skal leggjast fram til alment eftirlit av nýggjum.

...

Góðkenningarskrivið er ein fráboðan, sum ikki í sær sjálvum gevur eini byggisamtykt rættargildið. Byggisamtykt - ella broyting í byggisamtykt - fær rættargildið, tá viðkomandi byggisamtykt og kort hava fingið fysiska átekning frá Umhvørvismálaráðnum og eru kunngjørd sambært § 7, stk. 1 í løgtingslóg um býarskipanir og byggisamtyktir.

Umhvørvismálaráðið sendi Tvøroyrar kommunu góðkenningarskriv 11. juli 2023. Tá var Umhvørvismálaráðið liðugt við sína viðgerð av málinum, og var komið til ta niðurstøðu, at treytirnar fyri at góðkenna broytingarnar í byggisamtyktini, soleiðis sum Tvøroyrar kommuna hevði biðið um, vóru loknar.

Saman við góðkenningarskrivinum sendi Umhvørvismálaráðið Tvøroyrar kommunu broytta kortskjalið við fysiskari átekning. Umhvørvismálaráðið setti seg síðani í samband við Tvøroyrar kommunu og bað um at fáa broyttu byggisamtyktina til átekningar. Umhvørvismálaráðið rykti Tvøroyrar kommunu eftir broyttu byggisamtyktini 15.09.2023.

Tann 22.09.2023 sendi Tvøroyrar kommuna Umhvørvismálaráðnum broytta byggisamtyktartekstin og nýtt kortskjal við sama formliga innihaldi sum kortið, ið Umhvørvismálaráðið áteknaði 10.07.2023.

Umhvørvismálaráðið áteknaði sama dag - 22.09.2023 bæði broyttu byggisamtyktina og nýggja kortskjalið og sendi hesi til Tvøroyrar kommunu saman við einum nýggjum góðkenningarskrivi, sum nærri enn tað áður senda greiddi frá, hvør tekstliga broytingin í

byggisamtyktini var. Í nýggja góðkenningarskrivinum var eisini skrivað, at kommunan ikki hevði gingið innkomnu mótmælunum á møti, sum ikki var skrivað í fyrra skrivinum. Hesar broytingar í góðkenningarskrivinum broyttu tó einki grundarlagið undir avgerðini um at góðkenna broyting í byggisamtykt, men broytta góðkenningarskrivið gevur eina meira fullfíggjaða mynd av málsviðgerðini hjá kommununi, sum Umhvørvismálaráðið kannaði, áðrenn avgerð um góðkenning var tikin.

Í nýggja góðkenningarskrivinum var eisini skoytt uppí ein tilvísing til § 7, stk. 1 í løgtingslóg um býarskipanir og byggisamtyktir, sum áleggur kommununi at kunngera góðkendu broytingarnar í byggisamtyktini beinanvegin. Talan er um eina áminning frá Umhvørvismálaráðnum til kommununa, men áminningin í sær sjálvari hevur ikki rættarligan virkna, við tað at skyldan hjá kommununi sambært § 7, stk. 1 er har, uttan mun til um Umhvørvismálaráðið skrivar tað í góðkenningarskrivið ella ikki. Tilvísingin til § 7, stk. 1 stendur nú í øllum góðkenningarskrivum, sum Umhvørvismálaráðið sendir kommunum í sambandi við góðkenning av byggisamtyktum og broytingum í byggisamtyktum.

Umhvørvismálaráðið ásannar, at viðgerðin av málinum, í ávísan mun kann tykjast merkt av vantandi handahógvi, og Umhvørvismálaráðið arbeiðir tí við at menna mannagongdirnar fyri viðgerð av býarskipanarmálum. Hetta snýr seg m.a. um at skipa samskifti við kommunurnar betri. Væntandi fer nýggja kunngerðin um lendisskrá, sum kemur í gildið 01.01.2024, eisini at bera við sær, at háttalagið hjá kommununum í sambandi við fyrireiking av byggisamtyktarbroytingum verður meira einsháttað og at málsviðgerðin hjá Umhvørvismálaráðnum í sambandi við góðkenning av tí sama verður einfaldari.

Tá hetta er sagt, so metir Umhvørvismálaráðið, at viðgerðin av málinum viðvíkjandi góðkenning av broyting í byggisamtyktini fyri Tvøroyri, sum henda klagan snýr seg um, hevur verið forsvarlig, at málið er nøktandi upplýst og at avgerðin um at góðkenna broyttu byggisamtyktina er røtt og hvílir á nøktandi grundarlag. Umhvørvismálaráðið metir ikki at fyrisitingarligir feilir eru gjørdir í sambandi við málsviðgerðina, og tey lýti, sum Umhvørvismálaráðið ásannar kunnu sigast at vera við handfaringini av málinum, hava ikki skapt iva um rættarstøðuna og hava ongan týdning fyri rættargildið hjá byggisamtyktini fyri Tvøroyrar kommunu.”

Tann 15. desember 2023 vórðu viðmerkingarnar hjá Umhvørvismálaráðnum sendar klagaranum til ummælis við einari freist áljóðandi 14 dagar.

Við skrivi, dagfest 10. januar 2024, sendi klagarin umboðsmanninum millum annað hesar viðmerkingar:

“

...

Borgarin hevur krav at kommunan í viðgerðini av byggisamtyktarmálinum leggur dent á, at broytingin, eins og øll onnur planlegging, verður regulerað við atliti at hóskandi og haldgóðari heildarplanlegging, og soleiðis at bú- og liviumstøður eru og verða virðiligar og

nøktandi. Óansæð hesum viðgongur Tvøroyar kommuna, at av tí at verandi virki er staðsett sum tað er, tala øll viðurskifti fyri, at ætlaða víðkan og bygging av mjøl- og lýsiverksmiðju verður gjørd sum framhald av verandi virkinum í miðbýnum á Tvøroyri. Her kann eftirlýsast um øll viðurskifti, eisini tey sum fevna um áhugamál borgaranna til liviligar umstøður, eru tikin við í ætlaðu staðseting av mjøl- og lýsiverksmiðju.

...

Býarskipanarnevndin er nevnd við fakfólkum og skal ummæla broytingar til byggisamtyktir, og geva tilmæli ella frámæli til landsstýrið um at góðkenna ella frámæla ætlaðu broyting.
...
Umhvørvissmálaráðið sigur seg hava tvey týðandi atlit at fyrihalda seg til, hvørt tað er neyðugt at leggja broytt uppskot fram av nýggjum. Partvís er talan um rættindi borgarans verða skerd av broytingini, og partvís um heimildir kommunustýrisins verða víðkaðar við broytingini. Afturat hesum verður nevnt avgerandi atlit, hvørt broytta uppskotið í høvuðsheitum er líkt uppruna uppskotinum, ella við øðrum orðum, hvørt broytta uppskotið hevur sama identitet, sum uppruna uppskotið. Uppruna uppskotið umrøður ikki 20 metur høgar goymslubrunnar og 60 metur høgan skorstein, so identiteturin kann sigast at verða rættuliga nógv annarleiðis í broytta uppskotinum.

Umhvørvismálaráðið gevur í 4 punktum sína tulking av endaligu ásetingini í broytta uppskotinum, og kann her viðmerkjast, at frávik í uppruna og broytta uppskotinum kunnu gerast til tekniskar húsalutir (pkt.2), meðan ítøkilig hædd verður ásett til goymslubrunnar og skorsteinar.

Til pkt. 3 verður viðmerkt at loyvi ikki kann gevast til goymslubrunnar og skorsteinar hægri enn ásett. Spyrjast kann so hvat sipað verður til í broytta uppskotinum har skrivað verður: Slík hægri bygging skal altíð sendast til almennar hoyringar. Ásett verður ein mest loyvda byggihædd á 20 og 60 metur, og einki verður nevnt um frávik frá hesum ásetingum. Almennar hoyringar verða bert framdar um talan er um at geva frávik frá ásettum reglum, sum skrivað í § 10 um Undantaksloyvi, og er orðingin Slík hægri bygging skal altíð sendast til almennar hoyringar uttan nakra lógarheimild. Almennar hoyringar, umrøtt sum grannahoyring, skulu gerast tá frávik til ásetingar eru uppá tal, men eru ikki nakað krav tá t.d. byggihæddir lúka ásett mest loyvdu mørk. Niðurstøðan kann tí bert verða, at orðingin hægri bygging altíð skal sendast til almennar hoyringar er uttan heimild í almennu byggisamtyktini og BK17, og avgjørt ein orðing sum Býarskipanarnevndin átti at verði vakin yvirfyri, næst at Umhvørvis- og vinnumálaráðið av røttum átti at gjørt Tvøroyrar kommunu vart við, og biðið um at fáa orðað av nýggjum, og, sum eisini kravt av Livilig kor á Tvøroyri, lagt alment fram av nýggjum soleiðis sum ásett í býarskipanarlógini.

Samanumtikið kann sigast at ”identiteturin” millum uppruna broytingaruppskotið og tað Umhvørvis- og vinnumálaráðið samtykti at góðkenna, heilt er horvin, næst at góðkendi teksturin ikki sampakkar við ásetingar um frávik í byggisamtyktini og bygningskunngerðini BK17 og varð betur ógjørdur.
...

> Í skrivinum verður eisini kunnað kring mótmæli ímóti broytingini, at: ”Kommunan skal viðgera innkomin mótmæli sambært fyrisitingarlógini”.
> ...
> Spyrjast kann um Býarskipanarnevndin og Umhvørvis- og vinnumálaráðið, í teim skjølum móttikin eru, hava gjørt sær tann ómak at eftirkanna um mótmæli eru viðgjørd sambært fyrisitingarlógini.
> ...
> “

Tann 11. januar 2024 vórðu viðmerkingarnar hjá klagaranum sendar Umhvørvismálaráðnum møguligar viðmerkingar við einari freist áljóðandi 14 dagar.

Tann 19. januar 2024 boðaði Umhvørvismálaráðið frá, at ráðið ikki hevði nakað at leggja afturat teimum viðmerkingum, sum longu vóru givnar við skrivunum tann 18. september 2023 og 14. desember 2023.

Tann 13. februar 2024 boðaði umboðsmaðurin pørtunum frá, at farið varð undir endaligu viðgerðina av málinum.

## 5. Niðurstøða

Viðgerð mín av hesum máli snýr seg um málsviðgerðina og góðkenningina, dagfest 10. juli 2023, hjá Umhvørvismálaráðnum av broyting av byggisamtykt fyri Tvøroyar kommunu, § 29 D: Havnarøki, stk. 4.

*Broytingin í § 29 D: Havnarøki uttan at orða nýggja serstaka byggisamtykt*
Broytingin, sum Umhvørvismálaráðið hevur góðkent í byggisamtyktini fyri Tvøroyrar kommunu, snýr seg um, at orðingin av § 29 D: Havnarøki, stk. 4 verður broytt.

Klagarin hevur gjørt galdandi, at broytingin ikki er í samsvar við ásetingarnar í løgtingslóg nr. 13 frá 21. mai 1954 um býarskipanir og byggisamtyktir, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 31 frá 17. mars 2022 (hereftir lóg um býarskipanir og byggisamtyktir). Klagarin vísir á, at Tvøroyrar kommuna ikki hevur gjørt nýggjar og greiniligar reglur, men einans hevur gjørt eina broyting í galdandi yvirskipaðu góðkendu byggisamtykt, sum kemur at verða galdandi fyri øll havnarøki í kommununi. Klagarin heldur, at broytingin bert átti at fevnt um ein avmarkaðan part av havnarøkinum og átti at verið gjørd við nýggjari serstakari byggisamtykt.

Umhvørvismálaráðið hevur í frágreiðing, tann 14. desember 2023, til umboðsmannin víst á, at ráðið ikki er samt við klagaranum í, at broytingin kravdi eina nýggja serstaka byggisamtykt. Ráðið vísir til dømis á, at tað er loyvt at víðka ella broyta eitt ávíst øki í byggisamtyktini, uttan at tað er neyðugt at broyta ásetingarnar í byggisamtyktini, sum galda fyri viðkomandi økisslag.

Eg eri samd við Umhvørvismálaráðnum í, at ein kommuna, sambært lóg um býarskipanir og byggisamtyktir, kann gera broytingar í eini byggisamtykt, herundir eisini í tekstinum fyri ávís øki, uttan at gera eina nýggja serstaka byggisamtykt hvørja ferð. Ein broyting í ásetingunum fyri eitt ávíst øki, krevur eftir míni meting ikki neyðturviliga at nýggj serstøk byggisamtykt verður gjørd, um so er at myndugleikin ynskir, at broytta ásetingin skal vera galdandi fyri alt hetta økið.

Sambært upplýsingunum í málinum var Tvøroyrar býráð kunnugt við sjónarmiðið um, at havnaøki, har ynski er um at útbyggja í løtuni, heldur skuldi verið viðgjørt í egnari serstakari byggisamtykt. Tvøroyrar býráð hevur sostatt haft kunnleika til sjónarmiðið og tikið støðu til tað, við at samtykkja at broyta tekstin fyri alt økið § 29 D: Havnarøki.

Eg haldi ikki, at lóg um býarskipanir og byggisamtyktir kann sigast at innihalda krav um serstaka byggisamtykt í hesum føri. Eg haldi sostatt ikki, at Umhvørvismálaráðið av hesum ávum hevði orsøk til at nokta at góðkenna uppskotið til broyting av § 29 D: Havnaøkið í byggisamtyktini fyri Tvøroyrar kommunu.

*Kanningin hjá Umhvørvismálaráðnum av formligu viðurskiftunum*
Sambært frágreiðing frá Umhvørvismálaráðnum, dagfest 18. september 2023, fekk Umhvørvismálaráðið umsókn frá Tvøroyrar kommunu um at góðkenna broyting av byggisamtykt fyri havnarøki "D" á Tvøroyri tann 11. mai 2023. Umhvørvismálaráðið kannaði síðani, um formligu viðurskiftini í sambandi við broytingina vóru í lagi, herundir um kunngjørt var um framløgu, sum ásett í § 6, stk. 1 í lóg um býarskipanir og byggisamtyktir.

Í § 6 stendur millum annað: .

> "stk. 1. Áðrenn uppskot um byggisamtykt verður sent landsstýrismanninum, skal tað verða lagt fram í minsta lagi 3 vikur til alment eftirlits á einum fólki atkomuligum staði. Kommunan skal frammanundan á vanligan hátt kunngera, at byggisamtyktin er framløgd til eftirlits, og kunngerðin skal skila til, hvørt økið tað er, ið uppskotið umfatar. Mótmæli móti uppskotinum, og broytingaruppskot mega verða send kommunustýrinum, áðrenn 6 vikur eru lidnir frá kunngerðardegnum."
>
> Stk. 3. Landsstýrismaðurin kann, tá ið mett verður, at eitt uppskot eigur at verða broytt í einum ella fleiri førum, áðrenn tað kann verða góðkent, gera av, at kommunustýrið av nýggjum skal leggja uppskotið við teim ætlaðu broytingum fram til alment eftirlits aftaná kunngerð eftir reglunum í stk. 1.
>
> …
>
> Stk. 4. Somuleiðis kann kommunustýrið, tá ið tað, orsakað av innkomnum mótmælum ella broytingaruppskotum, hevur samtykt at broyta hitt upprunaliga

> uppskotið, fáa í lag, at uppskotið við hesum broytingum verður framlagt av nýggjum.”

Í hesum føri hevði Tvøroyar kommuna lagt fram eitt uppskot til broyting og kunngjørt broytingina eftir reglunum í § 6, stk. 1. Eftir at tíðarfreistin var farin, tók býráðið støðu til innkomin mótmæli, eins og tað á býráðsfundi tann 27. apríl 2023 samtykti, at ásetingin í §29 D: havnarøki, stk. 4, skuldi fáa eina aðra orðing enn hana, sum hevði verið í almennu kunngerðini. Síðani varð broytta orðingin send Umhvørvismálaráðnum til góðkenningar.

Hetta førdi við sær, at umsóknin til Umhvørvismálaráðið viðvíkti góðkenning av nýggjari orðing, sum býráðið hevði samtykt eftir, at broytingin hevði verið alment kunngjørd eftir reglunum í lóg um býarskipanir og byggisamtyktir. Henda broytta orðing var sostatt ikki alment lýst.

Umhvørvismálaráðið hevur víst á, at ráðið metti, at talan var um eina broyting, sum ikki broytti identitetin í upprunaliga uppskotinum, sum vildi verið fortreytin fyri, at ráðið kravdi nýggja hoyring. Umhvørvismálaráðið hevur í hesum sambandi víst á § 6, stk. 3 og stk. 4 í lóg um býarskipanir og byggisamtyktir sum áseta, at landsstýrismaðurin, í teimum førum har uppskot eru broytt, kann krevja at uppskotið verður lagt fram til alment eftirlit av nýggjum.

Umhvørvismálaráðið tulkar orðið <u>kann</u> á tann hátt, at landsstýrismaðurin ikki <u>skal</u> krevja, at nýggja uppskotið verður lagt fram til alment eftirlit. Á sama hátt metir Umhvørvismálaráðið, at kommunustýrið <u>kann</u> leggja broytta uppskotið fram av nýggjum, men at hetta ikki er eitt ófrávíkiligt krav. Umhvørvismálaráðið leggur dent á, at ásetingarnar lata upp fyri, at tað ikki í øllum førum er neyðugt at leggja broytt uppskot fram til alment eftirlit av nýggjum.

Í metingini um, hvørt tað er neyðugt at leggja broytt uppskot fram til alment eftirlit av nýggjum, metir Umhvørvismálaráðið um hesi atlit:
- um rættindi borgarans verða skerd av broytingini og
- um heimildir kommunustýrisins verða víðkaðar við broytingini.
- Harumframt er eitt avgerandi atlit, hvørt broytta uppskotið í høvuðsheitum er líkt upprunaliga uppskotinum ella við øðrum orðum, hvørt broytta uppskotið hevur sama identitet, sum upprunaliga uppskotið.

Í upprunaliga uppskotinum, sum varð lagt fram til alment eftirlit 23. februar 2023 stóð:

> Eingin partur av útveggi ella tekju má vera hægri enn 11,5 m, tó kunnu neyðugir tekniskir húsalutir, herundir siloir og skortsteinar, vera hægri eftir nærri góðkenning býráðsins.

Endaligi byggisamtyktarteksturin, sum Tvøroyrar býráð samtykti á fundi 27. apríl 2023, og sum Umhvørvismálaráðið góðkendi, tann 10. juli 2023, er:

> Eingin partur av útveggi ella tekju má vera hægri enn 11,5 m, tó kunnu neyðugir tekniskir húsalutir vera hægri eftir nærri góðkenning býráðsins. Goymslubrunnar kunnu í mesta lagi vera 20 m høgir, og skortsteinar í mesta lagi vera 60 m høgir. Slík hægri bygging skal altíð sendast til almennar hoyringar.

Umhvørvismálaráðið hevur greitt umboðsmanninum frá, at ráðið metir, at endaliga orðingin gevur ikki loyvi til nakað, sum upprunaliga orðingin í uppskotinum ikki gevur loyvi til, og at tað soleiðis er identitetur millum upprunaliga uppskotið, sum varð lagt fram til alment eftirlit og broytta uppskotið, sum Umhvørvismálaráðið góðkendi.

Eg eri ikki samd við Umhvørvismálaráðnum í hesi meting.

Kravið um at uppskot verða løgd fram til alment eftirlits og kravið um almenna kunngerð av ætlaðum broytingum í byggisamtykt mugu metast at vera ein grundleggjandi rættartrygd, so at øll, herundir borgarar og fyritøkur, hava sama møguleika at gera sína hugsan galdandi viðvíkjandi broytingum. Umhvørvismálaráðið leggur dent á, at loyvi ikki verður givið til nakað, sum upprunaliga orðingin ikki gav loyvi til. Havast má tó í huga, at byggisamtyktir ikki einans snúgva seg um at loyva virksemi, men eisini um at áseta avmarkingar fyri nýtslu av ávísum økjum.

Hóast broytta uppskotið í mun til klagaran helst ikki kann sigast at vera meiri inntrívandi, so inniheldur tað avmarkandi ásetingar, sum ikki vóru í fyrra uppskotinum, við tað at mark verður sett fyri hædd av goymslubrunnum og skorsteinum fyri alt § 29 D: Havnarøki, tvs. øll havnarøki í kommununi. Hetta ítøkiliga hæddarmarkið er ikki alment lýst, og borgarar og fyritøkur hava tí ikki haft høvi at gera viðmerkingar til broytingina.

Eg haldi tí, at tað var ikki í samsvar við § 6, stk. 1 og stk. 3 í lóg um býarskipanir og byggisamtyktir, at Umhvørvismálaráðið ikki kravdi, at uppskotið var lagt fram til alment eftirlits av nýggjum og nýggja almenna kunngerð av uppskotinum, áðrenn málið varð lagt fyri býarskipanarnevndina.

*Viðgerðin í býarskipanarnevndini*
Í lóg um býarskipanir og byggisamtyktir § 2 stendur at lesa um býarskipanarnevndina. Viðvíkjandi uppgávunum hjá býarskipanarnevndini er ásett í § 2, stk. 2:

> Stk. 2. Landsstýrismaðurin kann biðja býarskipanarnevndina um ummæli í sambandi við viðgerðina av uppskotum til býarskipanir og byggisamtyktir og broytingar í hesum. Landsstýrismaðurin ger starvsskipan fyri býarskipanarnevndina, har m.a. starvsøkið hjá nevndini verður nágreinað.

Í starvsskipan fyri býarskipanarnevndina, dagfest 13. juni 2022, er ásett í § 5:

> Stk. 1 Kommunan sendir umsóknina til aðalráðið, sum kannar um alt tilfarið, ið neyðugt er til viðgerð av málinum, er við í umsóknini um góðkenning. Tá alt tilfarið er við, verður umsóknin send Býarskipanarnevndini til ummælis.

Sambært starvsskipanini hevur Umhvørvismálaráðið sostatt ábyrgdina av at tryggja, at alt tilfar, ið er neyðugt til viðgerð av málinum, er við umsóknini, áðrenn tað verður lagt fyri býarskipanarnevndina.

Umhvørvismálaráðið sendi við teldupostí, tann 26. mai 2023, "uppskot til broyting í byggisamtykt fyri Tvøroyrar kommunu, víðkan av havnarlagnum" til ummælis hjá býarskipanarnevndini. Í teldupostinum vóru viðheft somu skjøl, sum Tvøroyrar kommuna hevði sent Umhvørvismálaráðnum við umsóknini. Tað sæst eingin viðmerking frá Umhvørvismálaráðnum í teldupostinum um, at Tvøroyrar kommuna søkti um góðkenning av aðrari orðing, enn henni sum framgekk av hjáløgdu almennu kunngerðini. Í skjalayvirlitinum sæst ikki nakað notat viðvíkjandi metingini hjá Umhvørvismálaráðnum av teimum formligu viðurskiftunum.

Býarskipanarnevndin viðgjørdi málið á fundi, tann 29. juni 2023, og viðmælti broytingini í áliti, dagfest 3. juli 2023. Í álitinum frá býarskipanarnevndini varð einki nevnt um broytingina í tekstinum, sum varð samtykt av Tvøroyar Býráð eftir almennu kunngerðina.

Í frágreiðingini frá Umhvørvismálaráðnum til umboðsmannin, dagfest 18. september 2023, sigur Umhvørvismálaráðið, at Umhvørvismálaráðið eftir móttøku av umsóknini frá Tvøroyrar kommunu fyrst kannaði, um formligu viðurskiftini vóru í lagi, herundir um kunngjørt varð um framløgu sum ásett í § 6, stk. 1 í løgtingslóg um býarskipanir og byggisamtyktir. Tá Umhvørvismálaráðið hevði staðfest, at formligu viðurskiftini vóru í lagi, sendi Umhvørvismálaráðið býarskipanarnevndini málið til ummælis, smb. § 2, stk. 2 í løgtingslóg um býarskipanir og byggisamtyktir.

Við støði í frágreiðingini frá Umhvørvismálaráðnum og § 5, stk. 1 í starvsskipanini skilji eg arbeiðsbýtið á tann hátt, at Umhvørvismálaráðið skuldi syrgja fyri, at formellu krøvini vóru uppfylt, áðrenn málið varð lagt fyri býarskipanarnevndina.

Hóast eg undrist á, at býarskipanarnevndin einki nevndi í áliti sínum um broytingina av orðingini eftir, at uppskotið hevði verið alment kunngjørt, havi eg, vísandi til omanfyri nevnda arbeiðsbýti, ikki grundarlag fyri beinleiðis at finnast at býarskipanarnevndini.

Afturat tí lógaráløgdu notatskylduni í fyrisitingarlógini hava fyrisitingarmyndugleikar eisini eina víðkaða notatskyldu, sum byggir á eina ikki-lógarfesta fyrisitingarliga meginreglu. Hendan skyldan fevnir um at skriva upp innihaldið á øllum upplýsingum, sum hava týdning fyri málsviðgerðina og málsgongdina. Eg haldi, at metingin hjá Umhvørvismálaráðnum um, at

identitetur var millum alment kunngjørda uppskotið og tað broyttu orðingina, sum varð send til góðkenningar, má metast at vera upplýsingar av týdningi fyri málsviðgerðina. Eg haldi tí, at metingin átti at verið skrivað í notat og skjalførd í málinum eftir víðkaðu notatskylduni.

Samanumtikið haldi eg tað tí ikki vera nøktandi, at Umhvørvismálaráðið í sambandi við kanning sína av formligu viðurskiftunum at sýna til ikki skrivaði eitt notat um sína meting av formligu viðurskiftunum, áðrenn tað var sent býarskipanarnevndini til ummælis.

*Góðkenningin hjá Umhvørvismálaráðnum, dagfest 10. juli 2023*
Eftir at býarskipanarnevndin í álitið, dagfest 3. juli 2023, viðmælti ætlaðu broytingunum, sendi Umhvørvismálaráðið Tvøroyrar kommunu góðkenningarskriv, dagfest 10. juli 2023. Tá var Umhvørvismálaráðið liðugt við sína viðgerð av málinum og var komið til ta niðurstøðu, at treytirnar fyri at góðkenna broytingarnar í byggisamtyktini, soleiðis sum Tvøroyrar kommuna hevði biðið um, vóru loknar. Saman við góðkenningarskrivinum sendi Umhvørvismálaráðið Tvøroyrar kommunu broytta kortskjalið við fysiskari átekning. Í góðkenningarskrivinum varð ikki endurgivið, hvør góðkenda orðingin var.

Tann 11. september 2023 sendi umboðsmaðurin klaguna til viðmerkingar og spurdi í tí sambandi, hvørja orðing Umhvørvismálaráðið hevði góðkent. Umboðsmaðurin vísti til munin á tí kunngjørdu orðingini og tí orðing, sum Tvøroyar kommuna hevði sent til góðkenningar.

Í frágreiðing, dagfest 18. september 2023, greiddi Umhvørvismálaráðið umboðsmanninum frá, at tað uppskotið um broyting í byggisamtykt, sum víst varð til í góðkenningarskrivinum frá Umhvørvismálaráðnum til Tvøroyrar kommunu, dagfest 10. juli 2023, var uppskotið, sum Tvøroyrar kommuna sendi Umhvørvismálaráðnum tann 11. maj 2023 (j.nr. 23/00071). Orðingin var sostatt tann tillagaða orðingin sum Tvøroyrar býráð samtykti 27. apríl 2023.

Eftir hetta sendi Umhvørvismálaráðið, tann 22. september 2023, Tvøroyrar kommunu rætting til góðkenningarskrivið, dagfest 10. juli 2023. Í rættaða góðkenningarskrivinum varð broytta orðingin endurgivin sum verandi tann góðkendi teksturin, eins og rættaður byggisamtyktartekstur og kortskjal við átekning frá Umhvørvismálaráðnum vóru hjáløgd.

Vísandi til viðmerkingar mínar omanfyri, eri eg ikki samd við Umhvørvismálaráðnum í, at talan var um identitet millum orðingarnar. Treytin fyri hesum vildi eftir mínum tykki verið, at talan var um sama innihald, tó við eitt nú broyttum orðavali ella rætting av stavivillum. Í hesum føri vórðu ítøkilig hæddarmørk og treytir fyri ávís viðurskifti sett inn, sum ikki vóru har áður. Eg haldi ikki, at lógarkravið um at leggja fram til alment eftirlits og um almenna kunngerð fellur burtur, um eitt samt býráð tekur undir við eini innihaldsligari broyting aftaná, at eitt uppskot hevur verið alment lýst. Umhvørvismálaráðið átti tí at kravt, at uppskotið varð lagt fram til alment eftirlits av nýggjum og nýggja almenna kunngerð av uppskotinum, samsvarandi § 6, stk. 1 og stk. 3 í lóg um býarskipanir og byggisamtyktir, áðrenn uppskotið varð lagt fyri

býarskipanarnevndina. Av somu orsøk haldi eg, at Umhvørvismálaráðið ikki átti at góðkent uppskotið tann 10. juli 2023.

Eg fari at geva Umhvørvismálaráðnum eina átalu fyri málsviðgerðina av hesum máli. Eisini fari eg at mæla Umhvørvismálaráðnum til at endurskoða málið og lata meg frætta, hvat víðari hendir í málinum.

Hanna Vang
Løgtingsins umboðsmaður